## 74,7 km til Klaksvíkar

**Landsverk:** Á heimasíðu síni hevur Landsverk nú kunngjørt eitt yvirlit yvir longdina á teininum at koyra úr høvuðsstaðnum til næststørsta býin, Klaksvík. Sambært hesum yvirliti er hetta vegastrekkið 74,700 metrar langt. Hinvegin so vísir yvirlitið eisini, at tað av einihvørji undarligari orsøk eru 60 metrar longri hjá klaksvíkingum at sleppa til Havnar, tað er: 74,760 metrar.



## Legur fyri alla familjuna

**Nesvík:** Tvey vikuskiftið í februar mánaði skipar Heimamissiónin fyri tveimum familjulegum í leguhúsinum í Nesvík. Fyrra legan verður vikuskiftið 15. til 17. februar og tann seinna vikuskiftið eftir. Umframt ítriv, spæl, hugnaløtur, bíbliutímar fyri allar aldursbólkar og nógvar fríløtur, verða eisini tvey evni viðgjørt – barnauppaling og hvussu ein heldur kærleikanum viðlíka í hjúnarlagnum. Legan kostar 1000 kr. fyri familjuna.

30. januar 1933:

# Tá Hitler gjørdist ríkiskanslari

**Tann nationalsosialistiski arbeiðaraflokkurin, NSDAP fekk bara 2,6% av atkvøðunum til ríkisdagsvalið í 1928. Fimm ár seinni tók Adolf Hitler valdið**

75 ÁRA MINNI
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Flokkurin æt upprunaliga “Deutche Arbeiter Partei” – DAP, týski arbeiðaraflokkurin. Adolf Hitler legði ofta dent á, at hann var limur nr. 7 í DAP. Og hann teknaði seg sum lim í 1919, beint aftaná týska ósigurin í Fyrra Veraldarbardaga (1914-1918). Teir ið stovnaður DAP vóru menn, sum vóru beiskir um Versailles-friðin, sum teir mettu verða eina eyðmýking av Týsklandi. Men sjálvt limanummarið hjá Hitler var ikki í tráð við sannleikan. Anthon Drexler, sum stovnaði DAP av fyrstan tíð sendi eitt mótmælisskriv til Adolf Hitler í 1940, og minti hann á, at hann var limur nr. 555 í DAP. Men tann sannleikin – sum so mangir aðrir – kom ikki fram fyrr enn aftaná kríggið. Men limanummar ella ikki, Adolf Hitler stendur sum tann ræðuliga ímyndin av DAP, sum í 1921 broytti navn til “Nationalsozialistische Deutche Arbeiterpartei” – NSDAP.



*Adolf Hitler sum nývaldur ríkiskanslari, saman við Hindenburg kanslara, sum hann vann á*

### Kvettroynd í 1923

Hitler og hansara menn byrjaðu at skipa seg. Teir hildu ógvusligar fundir við antisemitiskum boðskapum, og hevndarhugi ímóti teimum, sum høvdu verið orsøkin til, at Týskland tapti Fyrra Veraldarbardaga. Boðskapurin rein ikki við mong í byrjani, men so við eitt gjørdist Hitler kendur í øllum Týsklandi. Í 1923 løgdu teir í NSDAP ætlarnir um at gera eitt statskvett, sum skuldi byrja í München, og síðani fevna um alt Týskland. Kvettroyndin bleiv fyrireikað á einari ølstovu, og í søgubókunum kom hon at eita “Ølstovukvettroyndin”. Kvettroyndin miseydnaðist, Hermann Göring og Hitler vórðu báðir særdir undir gøtubardøgunum. Í 1924 kom Hitler fyri rættin, og hann nýtti høvið at tala fyri víðgongdu sjónarmiðum sínum. Rættarmálið bleiv meiri ein politiskur sjónleikur, enn eitt rættarmál um landasvik. Dómarin, Georg Neithardt hevði stóran samhuga við sjónarmiðunum hjá Hitler, og tí fekk Hitler ein mildan dóm. Hann fekk 5 ára fongsulsrevsing, men kom bara at sita í Landsberg-fongslinum í 10 mánaðir. Men hesar 10 mánaðir brúkti hann at skriva sítt ræðu-manifest, sum hann nevndi “Mein Kampf”.

### Neyðin í 20-unum

Týski búskapurin skrambblaði saman eftir Fyrsta Veraldarbardaga. Í 1918 kundi man keypa ein amerikanskan dollara fyri 4 týskar markar. Í 1922 skuldu 400 markar til at keypa ein dollara. Og í 1924 kravdust 7000 markar fyri at keypa ein dollara. Týski tjóðbankin prentaði peningaseðlar, sum høvdu eitt áljóðandi virði upp til 10.000.000.000 markar. Peningakervið datt sundur, og eitt túsindatal av fyritøkum fóru á húsagang. Lítið nyttaði at eiga pening á bók, tí teir høvdu einki virði. Ein týskur arbeiðari kundi arbeiða alt samdøgurið, men fekk ikki nóg mikið av peningi til at breyðføða sína familju. Fleiri miljónir høvdu einki arbeiðið. Týski búskapurin fekk tó ein skáa í árunum millum 1926 og 1929. Men aftaná krakkið á Wall Street í 1929 kravdi USA, at Týskland betalti øll lánini aftur í einum. Heimskreppan rakti meint, og tá var aftur galin endi við týska búskapinum.

### Úr 2,6 til 44

NSDAP fekk bara 2,6% av atkvøðunum til ríkisdagsvalið í 1928. Men við heimskreppuni í 1929 fingu teir víðgongdu flokkarnir vatn á mylnuna aftur. Í september 1930 atkvøddu 18,3% fyri NSDAP, og 13% atkvøddu fyri KPD, týska kommunistaflokkinum. Í 1928 høvdu bara 810.000 av 31.000.000 veljarum valt NSDAP, men í 1930 var talið komið uppá 6.371.000. Tað gav 107 tingmenn. Til valið í 1932 fekk NSDAP 13.732.779 atkvøður, og 230 tingmenn. Teir vóru farnir úr 2,6% upp í 44% av atkvøðunum, uppá bara 5 ár. Nógv av teimum ríku ídnaðarfólkunum stuðlaðu Hitler. Tann konservativa valdselitan við forsetanum, Paul von Hindenburg á odda vóru við til útnevna Hitler ríkiskanslara tann 30. januar í 1933. Teir høvdu eina vón og illusjón um, at teir kundu stýra honum fyri at knúsa tær kollveltingarsinnaðu kreftirnar. Men teir mistóku seg so dyggiliga, og søgan fordømir teir fyri hetta. Teir blivu knúskaðir sjálvir. Týskland fekk eitt hernaðarligt ræðslustýri, og 12 ár seinni lá alt Týskland, og ein stórur partur av Heiminum í knúsi. Tað kravdi, at tann konservativi Churchill, kommunistiski Stalin og tann kapitalistiski Roosevelt stóðu saman fyri at kunna sigra á Hitler, og tí Triðja Ríkinum. Vesturtýskaland og tað sameinda Týskland, hava altíð havt eitt sperrimark uppá 5% til ríkisdagin í fyrst Bonn, og síðani Berlin. Summi meta hetta verða ógvuliga strangt, men høvuðsorsøkin er, at týskarar ynska ikki at koma í tað kaotisku politisku støðuna, sum Weimar-Lýðveldið (1919-1933) við sínum mongu politisku flokkum kom í, ferð eftir ferð.



# Javnstøðunevndin hartar Dimmalætting

**Javnstøðunevndin hevur givið fyrrverandi marknaðarleiðaranum á Dimmalætting viðhald í kæru, og hevur álagt blaðnum at rinda 150.000 krónur í endurgjaldi**

JAVNSTØÐA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri aðru ferð innan fáar dagar hevur Javnstøðunevndin givið kærara viðhald í spurningi um mismun vegna viðgongu og barnsburð.

Málið hesaferð snýr seg um Majbritt Jacobsen, sum kennir seg kroysta úr starvi á Dimmalætting eftir at hon hevði verið í barnsburðarfarloyvi.

Dimmalætting sigur hinvegin, at talan var um bygnaðarbroytingar í fyritøkuni, og at blaðið setti ein skikkaðan leiðara. Hjalgrím Samuelsen, stjóri á Dimmalætting, sigur í tíðindaskrivi, at fyritøkan ikki góðtekur niðurstøðuna hjá Javnstøðunevndini, og at blaðið fer at kæra nevndina fyri løgtingsins umboðsmann.

Javnstøðunevndin sigur í síni niðurstøðu, at »Nevndin metir, at brot er framt á § 6 í javnstøðulógini, at Majbritt Jacobsen vegna uppsøgnina frá P/F Dimmalætting hevur verið fyri týðandi mismuni vegna viðgongu og eigur at fáa 25 vikur í løn sum samsýning, mettar til kr. 6.000, ella kr. 150.000 tilsamans«

Sum nevnt hevur Dimmalætting boðað frá, at teir fara at kæra Javnstøðunevndina fyri løgtingsins umboðsmanni.

Javnstøðunevndin hevur álagt Dimmalætting at gjalda 150.000 krónur í endurgjaldi, men tað vil blaðið ikki. Teir fara í staðin at kæra niðurstøðuna til løgtingsins umboðsmann